# Bjóða forkunnugt jólaborðhald

**Sum eina leingjan av ferðavinnuátakinum í summar bjóða nólsoyingar nú fyritøkum at halda jólaborðhaldið í oynni, í somu hugnaligu húsunum, har kunningarstovan heldur til um sumrarnar**

JÓLABORÐHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

»Mann sær ikki skógina fyri berum trøum« er eitt beinrakið danskt orðatak, og samantvinnað við føroyska sannleikan um, at »gløgt er gestsins eyga«, fært tú júst tað samansjóðing sum førdi til, at Nólsoy í summar kundi lata upp eina kunningarstovu í oynni.

Tá var tað fyri tað allarmesta tilfluttir nólsoyingar, sum tóku stig til átakið, og nú bjóðað verður fyritøkum og stovnum at koma út í oynna at halda sítt jólaborðhald, eru tað eisini í hesum føri tilfluttir nólsoyingar, ið hava sæð og tikið stig til hendan møguleikan.

- Tað er bæði fyri at kunna bjóða handlum, stovnum og fyritøkum eitt øðrvísi jólaborðhald, men eisini fyri at kunna útnytta teir framúr góðu og hugnaligu karmar, sum Petersens Pakkhús hevur at bjóða, sigur Guðrun Sundar Hansen, sum sjálv er havnarfólk, flutt til Nólsoyar.

Saman við Evy Toftegaard Nielsen, fuglfirðingi, flutt til Nólsoyar, tosaðu tær um hendan áhugaverda møguleika og drógu síðani Fríðu Jacobsen, heimafturvendur nólsoyingur, sum til gerandis arbeiðir innan matvøruøkið, inn í ætlanina.

- Hetta verður eitt heilt øðrvísi jólaborð, tí talan verður um bæði eitt traditionelt jólaborð og eina útferð.



Tað eru Fríða Jacobsen, Evy Toftegaard Nielsen og Guðrun Sundar Hansen, ið hava tikið stig til at skipa fyri jólaborðhaldum í hugnaliga Petersens Pakkhúsi við frálíkum útsýni yvir havnarlagið, bara eitt hanagleiv frá har Ritan leggur at



Karmurin er sera hugnaligur í Petersens Pakkhúsi, ið er frá 1700-talinum, og sum kunningarstovan eisini húsast í um sumrarnar, greiða tær tríggjar frá.

## Alt-í-einum

Maturin, tær tríggjar bjóða, er traditionellur jólaborðhaldsmatur við »eksotiskum« ísletti. Tað fer at merkjast, at mann er úti á bygd, og møguleiki verður fyri eitt nú skurða ella svartfugli.

Talan verður um kalt borð við føroyskum fati og teir vanligu heitu jólaréttirnar. Vit hava ikki lagt okkum á nakra fasta matskrá, men fara at velja bestu rávøruna, ið er til taks, siga Guðrun, Fríða og Evy, sum eisini leggja dent á, at tær taka sær av øllum í sambandi við jólaborðhaldið, bæði mati og drekka.

Tankin aftanfyri er, at fyritøkurnar koma út til Nólsoyar við Rituni klokkan 19 leygarkvøld, fara meiri ella minni beinleiðis til borðs, hugna sær í tríggjar tímar og síðani aftur til Havnar við Rituni klokkan 22.25 at festa víðari.

- Av tí at jólaborðhaldini verða hildin í sama høli, sum kunningarstovan heldur til um sumrarnar, og at báturin hjá Ova er í sama húsi, ber sjálvandi til at síggja bátin og hoyra eitt sindur um Ova Joensen, um áhugi er í tí, siga stigtakararnir.

Tær hava ikki lagt seg á nakað fast undirhald, men eitt lítið sanghefti verður tó tøkt, og so verður ynski er um meiri á tí økinum, ber altíð til at tosa um tað.

Skipað verður fyri jólaborðhaldum fýra leygardagar á rað, fyrstu ferð 24. november og seinastu ferð 15. desember. Pláss er fyri 30 fólkum, og til ber at fáa meiri at vita ella melda til hjá Guðrun Sundar Hansen á tlf. 22 28 62.

# Stórt mentanarligt umhvørvi

**Tá Gamla Reinsarí er liðugt umvælt bæði innan og uttan, er alt økið eitt stórt mentanarligt øki, sum býurin kann vera stoltur av, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

MENTAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólk, sum hava lagt sína leið eftir Tórsgøtu seinasta hálva árið, hava lagt til merkis, at Gamla Reinsarí hevur verið mest sum múrað inni. Og tað hevur sína orsøk.

- Vit máttu taka eina støðu til, hvat gerast skuldi við bygningin. Tað var púra greitt, at hann kundi ikki standa so, sum hann stóð, og tí vóru kostirnir í veruleikanum tvinnir: antin at ríva húsini niður, ella at umvæla tey. Og fyri okkum var tann avgerðin løtt, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havnar Kommunu.

Hann vísir á, at undir hesari býráðssamgonguni hevur dentur verið lagdur á at varðveita gomlu og søguligu bygningarnar og húsini í kommununi, og nevnir Degns Hús og Müllers Pakkhús sum dømi.

- Vit halda tað ikki vera rætt, bara at ríva niður og beina burtur gomlu havnarmyndirnar. Tvørturímóti hava vit lagt dent á varðveita hesar, so býurin kann varðveita sín gamla identitet, sigur Heðin Mortensen.

Eftir at Gamla Reinsarí var eftirkannað vísti tað seg, at stórviðurin fyri ein part var góður, men kortini mátti ein munandi partur av honum skiftast út. Seint í vár ella tíðliga í summar – alt eftir hvussu tú roknar – varð so fari undir at taka gamla klædningin niður, og krevjandi arbeiðið við at skifta partar av stórviðinum út byrjaði.

Hetta er ikki bert krevjandi arbeiði í dugnað, men so sanniliga eisini í tíð. Men væl hevur gingist í hond, og nú er komið so langt ávegis, at veggurin út móti Tórsgøtu er tikin niður aftur, og til ber hjá fólki rættiliga at síggja, hvussu snøgt arbeiðið er gjørt á Gamla Reinsarí uttan.

Og tá heilt liðugt er uttandura, verður farið undir umvælingina innan.

## Mentanarøki

Tað er ikki nøkur endalig støða tikin til, hvat húsið skal nýtast til, tá tað er liðugt umvælt. Altso annað enn, at tað skal nýtast til okkurt mentanarligt.

- Fyrst og fremst ráddi um at fáa Gamla Reinsarí umvælt uttan, tí tað stóð satt at siga sum ein skomm í býnum. Nú tá liðugt er við umvælingini uttan, mugu vit taka eina støðu til, hvat húsini skulu nýtast til, tí tað má partvís takast við, tá farið verður innandura at umvæla, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at tað sjálvandi finnast skitsur ella tekningar av, hvussu húsini eiga at verða innrættað, men miðað verður eftir, at hetta skal verða so nær tí upprunaliga sum gjørligt.

- Fleiri hugskot og uppskot hava verið frammi um, hvat húsini skulu nýtast til, og møguleikarnir eru mangir. Tað einasta, sum stendur púra fast er, at talan verður um mentanarlig tiltøk, sum kunnu fevna um alt frá tónleiki, sjónleiki og upptraðkan til framsýningar, sigur Heðin Mortensen.

Røddir hava eisini verið frammi um at nýta Gamla Reinsarí til spælistað hjá tónleikabólkum at venja í, men Heðin Mortensen heldur ikki, at húsini eru best farin til hetta endamál.

- Vit fáa eitt stórt, ótrúliga gott mentanarøki og – umhvørvi har niðri í Tórsgøtu við Margarinfabrikkini, Tjóðpallinum, Posthúskjallaranum, Miðlahúsinum og nú eisini Gamla Reinsarí. Har finnast jú aðrir spennandi møguleikar, eitt nú við húsunum millum Gamla Reinsarí og Miðlahúsið, garagunum, sum kundi verið næsta stigið. Har hevði verið eitt frálíkt stað hjá tónleikarum at vant, og har kundu instrumentini staðið fast uppi, sigur Heðin Mortensen.

Ein annar møguleiki kundi verið at flutt Perlukonseptið niðan í Gamla Reinsarí.

- Tað skal verða pláss fyri bæði gomlum og nýggjum, og við snotiligum, nýumvældum Gamla Reinsarí hava vit aftur skapt eina vakra býarmynd í økinum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havnar Kommunu.





*Menn eru komnir óvanliga væl frá arbeiðinum at umvæla Gamla Reinsarí uttan. Liðugt verður fyrsta dagin, og so er klárt at fara undir umvælingina innan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*